# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sólskinssøga í skúlanum

Seinastu árini hevur tað verið langt millum góðu søgurnar í skúlanum. PISA úrslitini hava verið væl lakari, enn tey hava verið í okkara grannalondum, og skoðsmálini, sum skúlin hevur fingið, hava ikki verið stimbrandi.

Í morgun legði Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, úrslitini fram av landsroyndini, sum tey í 4. og 6. flokki vóru til í vár. Royndin var í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni, og úrslitini vóru væl betri, enn tey hava verið.

Ofta verður sagt, at í fjølmiðlahøpi er dapra søgan tann góða søgan. Soleiðis skal tað ikki vera í hesum førinum: Føroyska samfelagið - alt sum tað er – eigur at kenna seg eiga part í næmingunum og skúlanum, og skúlanæmingarnir verða tey, sum fara at mynda føroyska samfelagið. Tí eiga vit øll at fegnast um úrslitini, sum vórðu løgd fram í morgun. Serliga hugaligt er tað hjá lærarunum, sum tað so ofta hevur verið fokus á. Ikki minst, tá ið úrslitini ikki hava verið so góð, hevur tað verið at hoyrt, at ein av stóru trupulleikunum hevur verið, at útbúgvingarstøðið og arbeiðslagið í skúlanum hevur ikki verið nóg gott.

Tá ið sólskinssøgan nú er komin fram, eiga vit at heilsa skúlunum og lærarunum og ynskja teimum tillukku og blíðan byr í framtíðini. Næstu árini fara at vísa, um talan fer at verða um støðuga menning.

Ivaleyst fer nú at verða spurt og hugsað um, hvørjar orsøkirnar kunnu vera til, at støðið er hækkað. Hugburðurin til PISA kanningarnar hevur verið ymiskur, men uttan mun til, hvat vit halda um kanningarnar, so er tað eingin ivi um, at tær hava havt við sær, at tilvitanin um skúlan er nógv økt, eisini millum foreldrini. Politiski myndugleikin og umsitingin hava sett tiltøk í verk, sum tað væl kann hugsast hava havt síni árin.

Nú ræður um at halda tørn um góðu gongdina. Skúlin eigur framvegis at verða raðfestur so høgt, sum tað á nakran hátt ber til, og sjálvandi eigur tað at verða lagt soleiðis til rættis, at tað fæst sum mest fyri pengarnar – í undirvísing og umstøðum og tilfarið og møguleikum. Hetta taka landið og kommunurnar sær av.

Læraraútbúgvingin sigst vera fyri stórum broytingum. Í fjør fóru tey á Frælsinum undir nýggja royndarútbúgving. Tað ljóðar frá at vera mennandi og spennandi útbúgving fyri nútíðina og framtíðina, sum nú verður boðin komandi lærarum. Tað snýr seg um at fáa samband millum tann veruleika, sum lærararnir standa í kring landið og tað, sum er á skránni í útbúgvingini, og tað ræður um at skapa tilboð, sum kunnu førleikamenna tey, sum arbeiða í skúlanum.

Í dag fegnast vit sum sólskinssøguna samstundis, sum vit vóna, at áralagið framvegis verður gott í royndini at menna skúlan, sum er so týdningarmikil partur av grundarlagnum undir okkara alra framtíð.

**Sosialurin**

## Kommunurnar eiga skúlarnar og avgerðarrættin at niðurleggja skúlar

**HEÐIN MORTENSEN**
formaður,
Kommunusamskipan
Føroya



Í januar 2009 setti landsstýrið niður kommunala umskipanarnevnd at gera uppskot til kommunureform. Málið er m.a. kommunusamanlegging og útlegging av fólkaskúlanum til komandi stórkommunurnar at umsita fult og heilt.

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, hevur fleiri ferð alment boðað frá, at hon skjótast gjørligt vil hava fólkaskúlan skipaðan í skúlaøki. Endamálið við hesum er lutvíst at fáa skynsamari og bíligari rakstur av fólkaskúlanum, lutvíst at hækka fakliga støðið í undirvísingini.

Ætlanirnar hjá landsstýriskvinnuni eru sambært fjølmiðlunum nú so ítøkiligar, at tal og navn nú verða sett á allar teir fólkaskúlar, sum landsstýrið skal niðurleggja kring alt landið. Einar 35 í tali.

**Kommunalir skúlar**

Sambært fólkaskúlalógini hava kommunur skyldu til at veita øllum børnum undirvísing. Kommunurnar hava til hetta endamálið bygt – og byggja framvegis – skúlar kring landið.

Kommunurnar eiga skúlarnar og avgera tí, hvar børnini skulu ganga í skúla. Landsstýrið kemur við lærarunum.

Sambært lógini eru tað eisini kommunurnar, sum hava rættin at avgera, um ein skúli skal niðurleggjast. Henda avgerðin er so mikið týdningarmikil, at borgararnir kunnu krevja hana til fólkaatkvøðu.

Í sjálvum sær er ætlanin hjá landsstýriskvinnuni at savna skúlarnar í størri eindir skilagóð bæði fíggjarliga og undirvísingarliga. Hetta eru tí eisini ætlanir, sum Kommunusamskipanin og kommunurnar í stóran mun kunnu taka undir við, men sum krevja neyva viðgerð, áðrenn endalig støða kann takast.

Øllum er greitt, at verða 35 skúlar niðurlagdir, er talan er um kollveltandi inntriv í nærum hvørja bygd í Føroyum. Hetta kann tí ikki gerast uttan um lokala myndugleikan.

Men enn hevur landsstýriskvinnan ikki spurt kommunurnar eftir.

**Kommunureformurin og skúlareformurin**

Kommunureformurin er í veruleikanum eisini ein skúlareformur. Tá ið tær komandi stórkommunurnar fáa ábyrgdina av lærarunum kanska longu um hálvtannað ár, hava tær eisini fulla fíggjarliga ábyrgd av at skipa raksturin av øllum skúlunum í kommununi.

Tí hava flestu kommunur langtsíðan gjørt sær tankar um, hvussu skúlaskipanin verður rikin mest skynsamt í teirra avvarðandi økjum – ikki bert í mun til fíggjarligu orkuna og undirvísingarligu dygdina, men so sanniliga eisini í mun til trivnaðin hjá næmingum og fólkinum á staðnum annars.

Henda tilgongd er longu byrjað úti í kommununum. Hetta er eisini leiðin at ganga samsvarandi kommunureformurinum – at tað er og skal framvegis verða einstaka kommunan, ið hevur ábyrgdina at skipa og fíggja skúlaskapin lokalt.

Tað er tí sera hugstoytt og óheppið, at landsstýriskvinnan í mentamálum arbeiðir við kollveltandi broytingum á økinum uttan at samskifta við kommunurnar yvirhøvur. Kann tykjast, sum ætlar landsstýriskvinnan at taka sær alt ræðið á skúlaøkinum úr hondunum á kommununum.

Hesum mótmælir Kommunusamskipanin harðliga. Hetta er ikki á nakran hátt fremjandi fyri kommunureformin ei heldur skúlareformin.

Kommunusamskipanin mælir tí staðiliga landsstýriskvinnuni til alt fyri eitt at taka kommunurnar beinleiðis við í arbeiðið. Eitt er vist, at uttan semju og felags fatan millum land og kommunur á hesum avgerandi øki fyri alt tað føroyska samfelagið, spyrst als einki gott burturúr.

## Heilsan til Christoffer Jensen um heilivág

**HANS PAULI STRØM**
løgtingsmaður



Í speiskari viðmerking til mín vísir Christoffer Jensen á, at hann sum diabetikari brúkar ávíst slag av heilivági, sum ikki kann skiftast um við samsvarandi bíligari heilivág av øðrum merki. Tvørturímóti er avleiðingin fyri hann av átakinum hjá Apoteksverkinum, at hann nú skal gjalda 4-5 ferðir so nógv fyri sín serstaka heilivág, sum hann gjørdi áður.

Til hetta kann eg siga, at tað var ein fullkomiliga greið fyritreyt frá politiskari síðu, fyri at Apoteksverkið skuldi sleppa at gera hetta átakið fyri at fremja eitt skiftið frá dýrum til bíligan heilivág, at ongin sjúklingar skuldi gjalda meira, men helst minni. Altso, at tað eisini skuldi blíva bíligari fyri sjúklingin. Og ikki dýrari sum Christoffer vísir á í sínum føri.

Hetta er greitt brot á politisku fyritreytina fyri at fremja hetta átakið hjá Apoteksverkinum fyri skifti frá dýrum til bíligari heilivág við samsvarandi góðsku og eginleikum.

Tí vil eg taka upp við politiska myndugleikan á økinum at fáa hesi viðurskiftini í rætt lag, so skeivleikin, ið Christoffer vísir á, kann rættast.

Við bestu heilsanum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.